gult cyan magenta svart

Sjálvlærdur sló›brótari

JAZZ Danski trompetspælarin og tónasmi›jurin, Palle Mikkelborg, fær tónleikavir›isløn Nor›urlandará›sins

Edvard Nyholm Debes

Í okkara árum ver›ur nógv brúkt at geva vir›islønir fyri ymisk mentunnaravrik, og ofta eru ta› frammanundan kend og vird listafólk, i› vald ver›a at móttaka hesar vir›islønir. Í hesum sambandi ver›ur spurningurin ofta havdur á lofti, um ta› nú er tann rætti, sum hesafer› fær hendan hei›urin. Vit hava øll okkara egnu hugsan um listafólk og teirra arbei›i, og tískil vil altí› vera ómøguligt, at øll eru samd í einum slíkum máli. Ta› er eisini ringt at siga, um vi›komandi er tann einasti rætti til slíkan hei›ur, men vit kunnu so í øllum førum rokna vi›, at vi›komandi best líkur tær treytir, i› settar eru. Og havast má eisini í huga, at tann, i› fær vir›islønina, ver›ur mettur vi› hini listafólkini í uppskoti, og tískil vinnur hana í kapping vi› tey. Ta› kann helst ikki ver›a so nógv ør›vísi.

Sí›ani ver›ur altí› nógv tosa› um stóru peningaupphæddirnar, sum ofta fylgja vi› teimum størru vir›islønunum. Hví skulu hesi fólk, sum frammanundan eru so væl farin, fáa uppaftur meir? Hví ikki heldur hei›ra eitt yngri og minni múgvandi listafólk, sum meira hevur brúk fyri og tráar eftir vi›urkenningini og peningagávuni, og sum kann hugsast at hava størri part av einari skapandi framtí› framman fyri sær !

Til alt hetta er at siga, at ta› er meira greitt at vir›ismeta eitt stórt lívsverk, sum er framt, heldur enn at meta um, hvussu avrikini hjá einum sera gávuríkum fara at hátta seg fyri framman. Um stóru peningaupphæddirnar, sum vinnarin eisini fær, er at siga, at ringt er at vita, hvat anna› man skuldi givi›. Peningur er nú helst tann t‡›iligasta vir›ismetingin, vit hava á okkara døgum. Kanska tíanverri !

Um vit skulu hugsa um, at vir›islønin skal til ein listamann, sum hevur broti› sló›, so kann ikki sigast anna› enn, at Palle Mikkelborg er ein rættur móttakari av Tónleikavir›isløn Nor›urlandará›sins 2001. Í uppskoti vóru 12 onnur tónlistafólk úr Nor›urlondum, og sæ› í skininum av hesum hópi, mugu vit siga, at hann fekk kapping, men at munurin á Mikkelborg og hinum hóast alt er t‡›iligur.

Mikkelborg er kanska ta› gávuríkasta - og mest víttfevnandi fólki›, sum hevur veri›, og er, í donskum jazzi.

Mikkelborg var› føddur í Keypmannahavn undir krígnum í 1941.

Hann er sjálvlærdur trompetspælari og tónasmi›jur, og hevur tí í tónleikinum aldri havt anna› at líta á enn sínar egnu gávur og hegni. Og hetta er kanska upprunin til hansara heilt egna tónleikaunivers. Hann byrja›i at spæla trompet sum 15 ára gamal, og hev›i slíkar gávur, at hann longu tr‡ ár seinni kom vi› í Knud Raths orkestur og helt tey komandi árini áframm í m.a. kvintettini hjá Jørgen Borch. Í 1963 hev›i Danmarks Radio stovna› teirra fyrsta stóra jazzorkestur, Radiojazzgruppen, og her kom Mikkelborg vi› eftir at hava spælt trompet í bert seks ár. Sama orkestri bleiv hann lei›ari av 1967-70, samstundis sum hann eisini var limur í Radioens Big Band, ta› største jazzorkestri› hjá Danmarks Radio, í dag ví›agiti› um alla ver›ina.

Men Mikkelborg hev›i eisini hug at royna um hann kundi halda flogi› á egnum veingum, so hann stovna›i sítt egna áttamans orkestur longu í 1965. Eisini hev›i hann eina kvintett saman vi› heimskenda danska trummuspælaranum, Alex Riel, og spældu teir bæ›i á Montreux — og á Newport Jazzffestivalunum í 1968, - bá›ir av teimum størstu jazzfestivalunum, sum eru. Hetta ári› var hann eisini so frammaliga, at hann bleiv valdur til ársins jazztónleikara í Danmark.

Í hesum árum vóru eisini fleiri plátuinnspælingar vi› RadioJazzgruppen vi› Mikkelborg á odda, bæ›i sum lei›ara og tónaskaldi.

So her sæst longu, at vit hava vi› ein úrmæling at gera. Han kom sær skjótt fram í danska jazzlívinum og var ein tann gávuríkasti jazztónleikarin tá. Millum a›rar, seinni ví›agitnar danskar jazztónleikarar frá hesi tí› eru trummuspælarin Alex Riel og Niels Henning Ørsted Pedersen, sum sjálvur bleiv tilluta› Tónleikavir›isløn Nor›urlandará›sins í 1991. Í heila tiki› vóru hetta sera frugktagó› ár í danska jazzlívinum vi› Keypmannahavn sum einum at kalla europeiskum jazzmi›depli. Allir teir stóru amerikansku jazztónleikararnir spældu nógv í tí legendariska jazzhúsinum Montmartre, og hetta kom táver›andi fremstu donsku jazztónleikarunum til gó›ar. Teir spældu undir hjá teim stóru og kendu og lærdu av teimum.

Palle Mikkelborg ver›ur at hoyra á Listastevnu Føroya í august næsta ár

Hetta var sera gevandi jazzumhvørvi, sum eisini er ein fyritreyt fyri at skapa heilt stórar tónleikarar.

Fram til hetta var Mikkelborg mest ein sera gó›ur tónleikari, sum var› virdur fyri sítt gó›a handalag og fyri at stjórna og skriva tónleik. Men ta› var í hesum tí›arskei›i, fyrst í 70'unum, at jazztónleikurin tók eina vend, eisini í Danmark, og her var Palle Mikkelborg ein av teimum fyrstu og skjótastu at fylgja tí møguleikanum upp og skapa sítt egna tónleikaunivers.

V8 var eitt orkestur, Mikkelborg gjørdi saman vi› Alex Riel, og ta› vardi frá 1970-75. Hetta orkestri› tók trá›in upp frá tí rákinum, sum var úti í ver›, at jazztónleikurin bleiv meira elektriskt hátta›ur, og at a›rar stílartir blanda›ust í jazztónleikin. Orkestri› V8 leiddi so ví›ari til ta› fyrsta orkestri›, har Mikkelborg rættuliga fekk sett sítt stempul á, sum ein n‡skapari í donskum jazzi. Orkestri› Entrance.

Lurtar tú aftur í dag, er Entrance ta› orkestri›, har tú t‡›iliga hoyrir tann Mikkelborg, sum hann skuldi blíva.

Hansara tónleikur her er sera n‡brótandi, men tó melodiøsur og lættur at fata, og serliga saman vi› tangentspælaranum Kenneth Knudsen, sum eisini er ví›agitin í jazzinum, skapti Mikkelborg eitt heilt serstakt ljó›, sum er so nógv sítt egi›, at ongin hevur gjørt sær ómak at herma honum ta› eftir. Um vit skulu sammeta Entrance vi› naka›, kan ta› ver›a vi› legendariska Weather Report hjá Joe Zawinul, sum eisini hev›i ein heilt egnan máta, sum ongin annar enn teir sjálvir kunnu endurgeva.

Og hetta er ta› sum ger eitt tónlistafólk einastandandi.

At ta› er ført fyri at skapa sær sítt egna tónamál, sum ongin annar kann skriva ella tosa, men øll sum lurta onkursvegna lættliga fata.

Ta› næsta sló›brótandi stigi›, hann tók, var tá hann saman vi› Kenneth Knudsen og Niels Henning Ørsted Pedersen í 1986 innspældi plátuna "Heart to Heart", sum gjørdist rættulig fólkaogn í Danmark. Víst var ta› jazztónleikur á hesi plátu, men teir megna›u í so stóran mun at gera tónleikin einklan og lættskildan, at hann seyra›i beint inn.

Gó› løg í løttum og nor›urlendskum klangbúna, ein pláta heilt fyri seg sjálva. Sum altí›, hev›i Mikkelborg her bert teir allarbestu tónleikararnar afturat sær, og hesi evnini, bara at umgyr›a seg vi› teimum bestu, er eisini vi› til at skapa tann stóra listamannin.

Palle Mikkelborg hevur alla tí›ina, fram til í dag, veri› virkin í tónleikalívinum og hevur veri› nógv brúktur sum solistur hjá orkestrum uttanlands. Eisini hevur hann skriva› nógv verk til bigband og t.d. eisini symfoniorkestur. Omaná alt hetta, hevur hann arbeitt vi› einum stórum parti av teim t‡›andi fólkunum innan jazzin, bæ›i í Europa og USA.

Men Mikkelborg heldur áframm. Hann fekk mitt í 80'unum hug at skriva eitt verk til sína egnu stóru fyrimynd Miles Davis. Ta› skal hugur til at hætta sær undir eitt tílikt tiltak , tí Miles Davis var, og er enn, sæddur at vera ta› mest t‡›andi, sum yvirhøvur er hent n‡ggjari jazztónleiki.

Men høvi› kom, tá Miles Davis fekk tilluta›a Sonning vir›islønina í 1984, og Radiobigbandi› hjá DR samstundis fylti 20 ár. Mikkelborg samstarva›i vi› Miles Davis um verki› "Aura", sum bleiv spælt av Radiobigbandinum og ø›rum úrvalstónleikarum. Hetta var ein stórhending, sum gav ljó› um allan jazzheimin. Miles Davis var solistur á verkinum, sum seinni kom á plátu, og her hoyrist t‡›iliga, hvussu stóra vir›ing hesin lítilátni Mikkelborg hevur fyri Davis. Hetta er eitt verk, sum tónleikarliga gevur Davis alt ta›, hann hevur uppibori›, me›an tann lítilátni Mikkelborg heldur seg aftanfyri, har hann veit at hann í hesum føri, eigur at ver›a.

Fløgurnar frá Mikkelborg hesi seinastu árini hava bori› brá av, at hann altí› er n‡hugsandi og ikki er bangin fyri at n‡ta ta› n‡ggju tøknina í tónleikinum. Av tí at hann altí› gongur egnar lei›ir, er ta› ikki altí› at fyrsta ummæli› er so stórsligi›, men tá ta› er gingin ein tí›, so vísir ta› seg altí›, at líka miki› hvussu tú vendir tí, so er tónleikurin so gó›ur og var›andi, at tú kanst ikki anna› enn taka undir vi›, at Mikkelborg aftur hevur gjørt okkurt framúr og vi›komandi. Ta› ey›nast honum stórt sæ› hvørja fer›.

Nógv kann nevnast um tann virkna Mikkelborg, í okkara áhuga m.a. hansara holla samstarv vi› Óla Poulsen á tveimum teim seinastu fløgunum, men ta› vil blíva ov langt og vit høvdu ikki fingi› alt vi› allíkavæl.

Vi› sínum gávum og sínum vilja at skapa av n‡ggjum og vi› sínum alski til tann róliga nor›urlendska tónan, má hesin úrmælingur sigast at vera ein rættur vinnari av Tónleikavir›isløn Nor›urlandará›sins 2001.

Vit lata hann sjálvan enda vi› or›um, hann seg›i, tá hann bleiv almannakunngjørdur vinnari:

"Mere end hjerteligt tak for denne pris, som jeg værdsætter meget.

Jeg har tænkt en del over, hvad den nordiske tone er. Det er svært for mig selv at forklare. En amerikansk musiker talte en gang om at forskellen på folk fra hektiske steder og så fra Norden er, at alle musikere sender lyder ud. Men I nordboer venter på at høre ekkoet komme tilbage".

Vit kunnu nevna at vit fáa gle›ina at hoyra Palla Mikkelborg í samband vi› Listahátí›ina, august 2001.

Grundgeving frá NOMUS:

"Palle Mikkelborg tildeles Nordisk råds musikpris for en lang og succesrig karriere — altid eksperimenterende, improviserende, nyskabende og søgende. Som 'gæst' i mange forskellige musikmiljøer, heriblandt jazz, rock og klassisk, har han ladet en række indtryk inspirere sig til en helt unik produktion. Gennem et omfattende samarbejde med betydelige kunstnere og ensembler er Mikkelborg et anerkendt navn i hele Norden og i store dele af den musikverdenen. Gennem mange internationale gæstespil har han stærkt bidraget til at befæste Nordens position og ladet en nordisk tone lyde i det internationale musiklandskab."

Úrvaldur tónleikur vi› Palle Mikkelborg

Entrance
1977 / Live as well 1978

Exlibris
EXLCD 50018

Heart to Heart
(1986) Storyville STCD 4114

Hommage
(1990) Sonet SLPCD 1662

Anything but grey
(1992) Columbia 471614 - 2

Song tread lightly
(2000) Columbia 4982022

gult cyan magenta svart